


*Hjúnini Rúna og Jan Hentze skulu døma kvinnufinaluna í flogbólti leygardagin millum SÍ og Mjølnir, og tað verður fyrstu ferð, at ein kvinna stendur við netið sum dómari í einari føroyskari flogbóltsfinalu. Tey bæði hava tó dømt nógvar dystir saman í landskappingini í vetur*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

# Hjún døma kvinnufinaluna

**FLOGBÓLTUR** Rúna og Jan Hentze skulu døma kvinnufinaluna millum SÍ og Mjølnir leygardagin. Hetta er fyrstu ferð, at ein kvinna er partur av dómaratoyminum til eina føroyska flogbóltsfinalu

**Hilmar Jan Hansen**

Síðani Flogbóltssambandið fór undir steypakappingina í 2000, hava tað altíð verið altjóða dómarar, ið hava verið fyrstudómarar í finalunum. Fyrstu árini komu útlendskir dómarar hendavegin at døma, men síðani 2005 hevur Jan Hentze verið fyrstidómari – hvørja ferð við Tummas Óla Mortensen sum øðrumdómara.

Men í ár verður øðrvísi í kvinnufinaluni millum SÍ og Mjølnir, tí tá skal Jan hava kona sína, Rúnu Hentze, sum annandómara. Kvinnur hava ofta verið linjudómarar, og í ár verður eisini Rosa Jacobsen annar av linjudómarunum í kvinnufinaluni, men hetta verður fyrstu ferð nakrantíð, at ein kvinna standur við netið sum dómari.

– Eg havi dømt nógv í Eik-liguni í vetur, tí eg eri í sokallaða dómarabólkinum. Har havi eg bæði verið fyrsti- og annardómari, og so hvørt sum eg havi fingið fleiri og fleiri royndir, havi eg eisini verið alsamt tryggari í dømingini, sigur Rúna, sum eisini dømdi, tá hon var virkin sum spælari, tí tá máttu spælararnir sjálvir døma dystir hjá hvørjumøðrum.

– Í eini steypafinalu er nógv meira fokus á enn vanligt, og har plagar at vera so nógvur gangur, at eg noyðist helst at rópa harðari, men annars er hetta ein dystur sum allir aðrir. Jan og eg hava dømt nógvar dystir saman í vetur, so tað skal nokk ganga.

## Errin av konuni

Hóast Jan Hentze sum altjóða dómari hevur roynt bæði eitt og annað, er hann sjónliga errin av, at kona hansara sleppur at døma aðra steypafinaluna í ár, samstundis sum hann ikki dylur fyri, at hon hevur bæði neyðugar royndir og førleikar.

– Rúna hevur dømt nógv, serliga í vetur, og hon er eisini A-dómari, og hartil hevur hon eisini gjørt tað gott sum dómari. So við og við hevur hon oftari verið fyrstidómari, hóast hon at byrja við helt tað vera eitt sindur løgið, at eg sum altjóða dómari skuldi »bara« vera annardómari, sigur Jan, ið sær tað sum ein fyrimun fyri dømingina, at tey eru maður og kona.

– Vit kenna jú hvønnannan út og inn, og heima tosa vit nógv um døming. Eg haldi hetta vera bæði spennandi og stuttligt, og eg vóni, at hetta kann geva øðrum kvinnum hug at bjóða seg fram sum dómarar. Tá tú gevst at spæla, er dómaragerningurin eitt upplagt høvi til framvegis at vera ein virkin partur av spælinum.

Í mansfinaluni millum ÍF og Mjølnir verður Jan Hentze fyrstidómari og Tummas Óli Mortensen annardómari. Linjudómarar verða Sveinur Tróndarson og Óli G. Samuelsen, ið eisini er linjudómari í kvinnufinaluni.

*hilmarjan@sosialurin.fo*

# Finalurnar á netinum



*Savnsmynd: ÁLvur Haraldsen*

**FLOGBÓLTUR** Tá tey yngru flogbóltsliðini spæla sínar steypafinalur sunnudagin, síggjast allir dystirnir beinleiðis á internetinum, og tey spæla – eins og tey vaksnu – á serliga teraflex-gólvinum

**Hilmar Jan Hansen**

Leygardagin og sunnudagin verða ikki færri enn átta steypafinalur á skránni í ítróttarhøllini á Hálsi í Havn, nú flogbólturin stendur fyri tørni. Sum vanligt, verður nógv gjørt burturúr við serliga teraflex-gólvinum, bilum og lýsingum kring vøllin, umframt bestu umstøðum í aðrar mátar við.

Fyrst eru tað steypafinalurnar hjá teimum vaksnu, ið eru á skránni leygardagin, tá fyrst kvinnurnar hjá SÍ og Mjølnir spæla klokkan 13.30, og síðani menninir hjá ÍF og Mjølnir klokkan 15.30. SÍ og ÍF eru komin í finalurnar umvegis oddasessir í Eik-ligunum, tá so og so nógvir dystir vóru spældir, og Mjølnir-liðini eru bæði komin í finaluna, tí tey vunnu Fleyr- og Mjølnir-kappingina.

Sunnudagin eru so seks steypafinalur aftrat, tí tá skulu tey yngru royna seg, og umstøðurnar verða tær somu sum dagin fyri. Talan er um finalurnar hjá gentum og dreingjum 14 ár, gentum og dreingjum 16 ár og hjá kvinnu- og mansunglingum. Liðini, sum hittast í finalunum, eru tey, sum hava vunnið ella verið finalistar í Fleyr- og Mjølnir-kappingunum.

## Beinleiðis á netinum

Sum nakað nýtt, verða allar finalurnar hjá teimum yngru at síggja á internetinum, tí upptøkutól verður til staðar, og so verða livandi myndirnar »streamaðar« út á heimasíðuna hjá Flogbóltssambandinum, www.fbf.fo, so øll við atgongd til internetið kunnu fylgja við, hóast teimum ikki ber til at vera til staðar í sjálvari høllini, meðan spælt verður. Hetta verður gjørt upp á sama máta sum hjá hondbóltinum sunnudagin.

Finaludystirnir hjá teimum yngru eru hesir: Kl. 13.00 TB-KÍF (gentur 16), kl. 14.15 SÍ-TB (dreingir 16), kl. 15.30 Mjølnir/ÍF-TB (kvinnuunglingar), kl. 16.45 Tba/Fleyr-TBb/Fleyr (mansunglingar), kl. 18.00 SÍ-Ternan (dreingir 14) og kl. 19.15 Ternan-Fleyr (gentur 14).

Sum sæst, er TB tað stóra felagið í hesum bólki, tí TB eigur lið í øllum finalum uttan einari, og hjá mansunglingum er finalan enntá ein lokaluppgerð millum tvey TB-lið, ið annars eisini eru úrslit av einum samstarvi millum TB og Fleyr, eins og felags kvinnunglingaliðið hjá Mjølni og ÍF er tað.

*hilmarjan@sosialurin.fo*